## Tøgn fyri ferðsludeyðum

Fótbóltssambandið hevur sent út rundskriv, har mint verður á, at sunnudagurin er minningardagur teirra deyðu í ferðsluni. Heitt verður tí á feløgini – og áskoðarar – at hesi undan dystunum í Formula-deildini sunnudagin halda tøgn í ein minutt.

-mørk

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801



# Ítróttardómstólurin verður góðkendur

**Alt bendir nú á, at FSF fer at útflýggja Ítróttardómstólinum neyðugu pappírini, soleiðis at punktum kann setast fyri málinum um skjótt heimsgitna spæliloyvið hjá Páll M. Joensen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*ÍSF-húsið er ovari enn FSF-húsið. Og enn er tað ÍSF, sum er ovast, tá um ræður føroyskan fótbólt. Tað staðfesti rætturin, og nú tykist FSF eisini at akta boðini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað tykist, sum fekk HB veruliga sett tummilskrúvurnar á FSF, tá teir mikudagin fingu viðhald í, at fútabann skuldi setast fyri ætlaða dystinum á Eiði millum EB/Streym og VB/Sumba, til Ítróttardómstólurin hevur viðgjørt seinastu kæruna hjá HB.

FSF hevði annars á sín hátt sagt »fingrarnar vekk«, tá Ítróttardómstólurin bað um skjølini í málinum um Páll Mohr Joensen. Hetta tí FSF ikki metti, at hetta var eitt mál, sum kundi viðgerast av Ítróttardómstólinum. Og eisini tí FSF heldur fast um, at FSF hevur evsta vald á føroyskum fótbóltsviðurskiftum. Ein tulking, sum fyri tey flestu man tykjast dekan av strømm, so leingi sum FSF er limur í ÍSF undir verandi skipan.

### HB skar onga seinkan

Hóast FSF í rættinum fekk viðhald í, at HB skal seta trygd fyri møguligum missi av UEFA-peningi, so er tó lítið, sum bendir á, at HB á nakran hátt skal missa hendan pening. Sum so munnu teir høgu harrarnir í UEFA vera passaliga líkasælir, bara føroyski steypavinnarin er funnin áðrenn mai mánaður – um 11 mánaðir – er liðin. Og skuldi tað hent seg, at málið framvegis ikki er greitt til ta tíð, so kann FSF neyvan lasta HB fyri hesum.

Tí Ítróttardómstólurin sigur seg vera til reiðar at viðgera málið tann 10. juli, og verður tað gjørt, so eru neyvan teir heilt stóru trupulleikarnir at avgreiða steypafinaluna – tó at kann gerast trupult at røkka innan ólavsøku.

### Skjølini verða latin

Einasti møguleikin, at málið ikki verður avgreitt, tykist tí vera, at FSF ikki letur dómstólinum umbidna skjalatilfarið. Og yvir fyri hesum veruleika tykist tað, sum hevur FSF nú givið skarvin yvir í mótstøðuni móti ÍSF. Í øllum førum ljóðar, at FSF í dag fer at lata umbidnu skjølini frá sær, soleiðis Ítróttardómstólurin sleppur at tala.

Tað verður soleiðis upp til dómstólin – og ikki FSF - at gera av, hvørt kæran hjá HB kann viðgerast. Treytirnar fyri hesum eru tó, at talan er um spurningar um lóg og mannagongdir. Tí er ivasamt, hvørt dómstólurin tekur tann partin av kæruni upp, har biður um, at proportionalitetsregla skal verða galdandi, um HB skal revsast. HB biður tó eisini um, at ivin um, hvør brævið um leysgeving er sent FSF ella ikki, skal koma teimum tilgóðar, og tað er helt eitt mál, sum dómstólurin kann taka upp.

# B68 hvessir sær álopið

**Jørgin Meitilberg er fluttur aftur til Føroya, og hann skal ætlandi sparka toftamenn úr botninum á stigatalvuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru ivaleyst fá, sum geva B68 teir heilt stóru møguleikarnar í útivallardystinum móti EB/Streymi. Liðini bæði eru at finna í hvør sínum enda av stigatalvuni, og við ferðini, sum samanlagda liðið hevur havt í ár, ber illa til at ímynda sær, at stig verða sett til hesiferð.

EB/Streymur hevur hesa ferð Ronnie Samuelsen aftur á liðnum, eftir at hann helt brúðarhús, meðan liðfelagarnir stríddust á Skála. Saknurin í stríðsmanninum var sjónligur, og tí fegnast liðfelagarnir helst um, at hann nú aftur er tøkur.

Hjá B68 er tað helst dyggur smeitur, at bæði Ralph Van Dooren og Øssur Jacobsen eru leikbannaðir, eftir at teir fingu hvør sítt reyða kort á Vágseiði. Hinvegin hava toftamenn eisini styrkt sær um hópin við Jørgin Meitilberg, sum nú kemur aftur úr Danmark. Talan er kanska ikki um mest arbeiðssama áleyparan í landinum, men hann hevur máltev sum fáur, og tí er talan uttan iva um góða avlasting fyri Súna Fríða Barbá, sum higartil hevur verið mest sum einsamallur um at bera ta byrðuna á liðnum.

Dysturin á Eiði byrjar klokkan 16.

## GÍ skal venda gongdini

Við undantaki av útisigrinum móti HB, hava GÍ-úrslitini ikki verið nakað serlig seinastu tíðina. Javnlekur og stórtap á heimavølli móti ávíkvist ÍF og KÍ er ikki akkurát tað, sum roknast skal við av einum oddaliði, og tí skal byttan vendast, tá teir sunnudagin fara inn á Skála.

Talan verður tó um trupla uppgávu móti Skála, sum nú veruliga tykist hava fingið glið aftur á spælið. Seinastu viku vóru teir óhepnir, at talan ikki gjørdist um trý stig móti EB/Streymi, men spælið hevur leingi bent rætta vegin.

Skála hevur eisini allar spælarar tøkar til dystin. Hjá GÍ er Poul Arni Jacobsen leikbannaður, eftir at hann fekk reytt kort móti KÍ hóskvøldið. Hinvegin er Hans Jørgen Djurhuus aftur tøkur.

-mørk

## Rógvi fekk eitt stig

KR og Valur spældi 1-1 í íslendsku landskappingini hóskvøldið. Valur legði seg framum tíðliga í 1. hálvleiki, og KR javnaði, tá ið ein tími var farin.

Nú íslendska landskappingin er níggju umfør gomul og harvið hálvrunnin, er FH á odda við 23 stigum. So er tætt millum tey næstu: Víkingur hevur 14 stig, Grindavík, Fylkir og KR hava 13 stig, Valur hevur 12 stig, Keflavík og ÍBV hava 11 stig, Breiðablik hevur 10 stig og ÍA er aftast við 6 stigum.

10. umfar verður í næstu viku. KR skal hósdagin spæla á útivølli móti FH. Keflavík skal ikki spæla aftur í landskappingini fyrrenn 13. juli, tá ið teir eiga heimavøll móti ÍBV. Nú leygardagin skulu Símun Samuelsen og Keflavík spæla í Inertoto á útivølli móti norska Lillestrøm.

-jh